# Brúðarmyndir

*Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 25. september 2004, takka vit hjartaliga*
**Dóra & Jan**

*Hjartaliga takka vit øllum tykkum sum á hvør sín hátt gleddu okkum á silvurbrúdleypsdegi okkara tann 8. januar 2005. Ein serlig tøkk til tykkum sum á ein hvønn hátt gjørdu dagin so hugnaligan og ógloymandi. Eisini takka vit fyri fjarrit, heilsanir og gávur.*
**Heilsan Hansina og Martin**

*Hjartaliga takka vit øllum, ið vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 31. juli 2004 so hugnaligan og ógloymandi. Takk fyri gávur, fjarrit og alla hjálp á ymiskan hátt.*
**Blíðar heilsur Jona og Ólavur Thune**

Øllum tykkum sum gleddu okkum so stórliga á gullbrúðleypsdegi okkara 20. november 2004, takka vit hjartaliga, og eisini tykkum okkara beatu heilsur við Sálm 119.15.

Ein serstak takk til barn, avgarbarn og barnabarn okkara, ið tóku so væl um okkum hendu merkisdag. Sonuleiðis vinir og kenningar; til sum sungu, spæltu, yrktu og ikki at gloyma tykkum sum sungu hendu vakra morgun við heim okkara. Hjartans tákk alt sonnal.

Eisini takkað vit allum sum við gávum, telegrammum og á annan hátt gleddu okkum.

Samkomun í Betesda fer hjartans tákk fyri at vit kundu nýta hósdi til hesa gleðiliku leitu.

Til seinast ynskja vit allum eitt av Hansum signað nýtt við bestu heilsum.

*Grøtha og Løvi*



*"Higartil hevur Harrin hjálpt. Ebenezer"* 1 Sám 7,12

# Óhapp í Leirvík

*Lastbilurin trýsti Sam frá ferjuleguni og varð hangandi millum skipið og ferjuleguna*

**Eitt óhapp við ferjuleguna í Leirvík gjørdi ólag á ferðsluna um Leirviksfjørð seinnapartin hósdagin**

ÓHAPP
*Edvard Joensen*

Tá Sam um middagsleiðtið hósdagin skuldi taka ein blokkvogn við eini gravimaskinu umborð í Leirvík, hendi eitt óhapp, sum gjørdi, at bilurin, sum dróg vorngin, fór niður í millum skipið og ferjuleguna. Eingin skaði hendi kortini.

Sámal Petur í Grund, skipari á Sam, greiðir frá, at tá bilurin skuldi koyra umborð, vísti tað seg, at tað var ov høgt hjá honum at koma upp fyri á gronini á skipinum.

Ætlanin vr so at koyra í land aftur og venda skipinum, so bilurin kundi koma umborð á reyvini.

Men okkursvegna hevur bilurin á veg í land trýst so á skipið, at tað fór frá, og bilurin kom at hanga millum gronina á Sam og ferjuleguna.

Ferjuskráin leyp upp av festinum og datt niður, so framparturin av bilinum varð hangandi í leysari luft.

Sámal Petur í Grund, sigur, at eingin skaði stóðst av, hvørki á fólk ella materiell.

Ein stórur krani varð boðsendur at lyfta bilin upp aftur og fáa hann inn á trygga »grund«. Men fyrst varð skipið tryggjað so væl til bar við endum og wirum, greiddi skiparin frá.

Ohappið í Leirvík gjørdi, at Dúgvan mátti til Fuglafjarðar, og tað seinkaði so ferðsluni um Leirvíksfjørð nakað.